# Ársaðalfundur í P/F BankNordik 2021

**Ársaðalfundurin hjá P/F BankNordik verður hildin fríggjadagin hin 26. mars 2021 kl. 17.00 í høvuðssæti bankans á Oknarvegi 5 í Tórshavn.**

BANKNORDIK

## Fundarskrá

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2020
2. Framløga av ársfrágreiðingini fyri 2020 til góðkenningar, undir hesum ársroknskapur við grannskoðaraátekning
3. Uppskot um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapi fyri 2020
4. Val av nevnd

   a. Nevndin mælir til val av 5 aðalfundarvaldum nevndarlimum

   b. Val av nevndarlimum
5. Val av uttanhýsis grannskoðan
6. Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 og uppskot nevndarinnar til viðtøkubroytingar

   a. Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 um fráfall av quorum-kravinum sambært § 9.2. í viðtøkum bankans

   b. Uppskot nevndarinnar um broyting av § 9.3. í viðtøkum bankans
7. Uppskot nevndarinnar um nevndarsamsýningar fyri 2021
8. Ymiskt

**Viðv. punkti 1**
**Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2020**

Nevndin mælir til, at aðalfundurin tekur frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í 2020 til eftirtektar.

**Viðv. punkti 2**
**Framløga av ársfrágreiðingini fyri 2020 til góðkenningar, undir hesum ársroknskapur við grannskoðaraátekning**

Nevndin mælir til, at aðalfundurin góðkennir ársfrágreiðing bankans fyri 2020 [Annual Report 2020].

**Viðv. punkti 3**
**Uppskot um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapi fyri 2020**

Ársúrslitið hjá BankNordik er 166,2 mió. kr.

Nevndin mælir til hesa nýtslu av avlopinum sambært góðkenda ársroknskapinum fyri 2020:

Útgoldnar sum vinningsbýti verða 5 kr. fyri hvørt partabræv á nominelt 20 kr., svarandi til í alt kr. 48.000.000 ella 28,9% av ársúrslitinum.

Fluttar verða 118,2 mió. kr. til „Overført overskud".

Víst verður annars til ársfrágreiðingina fyri 2020 á síðu 45.

**Viðv. punkti 4**
**Val av nevnd**

**a.** Sambært § 10, stk. 2 í viðtøkum bankans velur aðalfundurin eina nevnd við 4-6 limum, sum skal sita til næsta ársaðalfund.

Á innkallingardegnum til ársaðalfundin eru 5 valevni uppstillað til nevnd bankans.

Nevndin mælir til val av 5 aðalfundarvaldum nevndarlimum.

**b.** John Henrik Holm, Barbara P. Vang, Gunnar Nielsen og Hans Arni Bjarnason Thomsen hava boðað frá, at tey ikki taka við afturvali til nevnd bankans. Ben Arabo og Jógvan Jespersen hava boðað frá, at teir taka við afturvali til nevnd bankans.

Bankin hevur móttikið uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992, Lind Invest ApS, Protector Forsikring ASA, P/F Tjaldur og PF Framherja, sum mæla til nýval av Sverre Bjerkeli, Jóhannu Lava Køtlum og Michael Ahm til nevnd bankans.

Nevndin mælir til afturval av Ben Arabo og Jógvani Jespersen, umframt til val av Sverre Bjerkeli, Jóhannu Lava Køtlum og Michael Ahm til nevnd bankans.

Viðvíkjandi fleiri upplýsingum um valevnisuppskot nevndarinnar, undir hesum førleikar og onnur leiðslustørv, verður víst til heimasíðu bankans www.banknordik.fo

**Viðv. punkti 5**
**Val av uttanhýsis grannskoðan**

Nevndin mælir til afturval av Januar, løggilt grannskoðanarvirki P/F, og afturval av PricewaterhouseCoopers Statsautoriseret Revisionspartnerselskab sum uttanhýsis grannskoðarar bankans.

**Viðv. punkti 6**
**Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 og uppskot nevndarinnar til viðtøkubroytingar**

**a.** Fráfall av quorum-kravinum sambært § 9.2. í viðtøkum bankans.

Fíggingargrunnurin frá 1992 skjýtur upp, at vikið verður frá kravinum um viðtøkuføri sambært § 9.2 í viðtøkum bankans í sambandi við, at ársaðalfundurin viðger uppskot nevndarinnar 6b.

**b.** Uppskot nevndarinnar um broyting av grein 9.3. í viðtøkum bankans.

Nevndin skjýtur upp at skifta verandi áseting í grein 9.3. í viðtøkum bankans við hesa: „Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 um broyting av ella fráfalli av quorum-kravinum í pkt. 9.2. kunnu samtykkjast við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeningi. Avmarkingarnar í pkt. 8.3 og pkt. 9.2 viðvíkjandi atkvøðu og fulltrú eru í hesum føri kki galdandi. Um Føroya Landsstýri gerst eigari av partabrøvunum, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 eigur í P/F BankNordik, fær Føroya Landsstýri samstundis heimildirnar, sum Fíggingargrunnurin frá 1992 hevur sambært hesum viðtøkum."

**Viðv. punkti 7**
**Uppskot nevndarinnar um nevndarsamsýningar fyri 2021**

Nevndin mælir til, at samsýningin til nevnd bankans verður óbroytt galdandi fyri 2021.

Nevndin mælir sostatt til, at aðalfundurin viðtekur, at samsýningin til nevndarlimir bankans verður latin samsvarandi samsýningarpolitikki bankans frá mars 2018 við støði í hesum satsum:

| | |
|---|---|
| Grundsamsýning: | 200.000 kr. |
| Nevndarformaður: | 3 x grundsamsýning |
| Næstformaður: | 2 x grundsamsýning |
| Aðrir nevndarlimir | 1 x grundsamsýning |

## Bílegging av atgongumerkjum

Rættur partaeigarans at luttaka á aðalfundi og at atkvøða í sambandi við partabrøv síni verður settur í mun til tey partabrøv, sum partaeigarin eigur skrásetingardagin. Skrásetingardagurin er fríggjadagin hin 19. mars 2021.

Hvør partaeigari, sum hevur rætt at luttaka á aðalfundi, og sum ynskir at luttaka, skal biðja um atgongumerki.

Atgongumerki kunnu bíleggjast á heimasíðu bankans www.banknordik.fo, umvegis partaeigaraportalin á www.banknordik.com, ella á høvuðsskrivstovu bankans á telefon 330 330.

Í sambandi við tilmelding umvegis partaeigaraportalin, verður elektroniskt atgongumerki sent til ta teldupostadressu, ið partaeigarin hevur skrásett í partaeigaraportalinum.

Partaeigarar skulu hava atgongumerki (elektroniskt ella útprent) við sær á aðalfundin. Eisini ber til at heinta bíløgd atgongumerki við inngongdina til aðalfundin, um samleikaprógv samstundis verður víst.

Seinasta freist at bíleggja atgongumerki er týsdagin hin 23. mars 2021 kl. 16.00.

Tá atgongumerki verða bíløgd, skal prógv førast fyri, at viðkomandi er partaeigari. Fyri partaeigarar, hvørs partabrøv ikki eru skrásett við navni, verða atgongumerki útgivin, um ein í mesta lagi 5 daga gomul útskrift frá VP Security A/S ella kontuførandi peningastovninum (depotstaðið), verður víst sum skjalprógv fyri partabrævaognina. Við útskriftini skal fylgja skrivlig váttan um, at partabrøvini ikki eru ella verða avhendað øðrum áðrenn skrásetingardagin.

Atkvøðuseðlar verða útflýggjaðir á aðalfundinum.

## Fulltrú

Partaeigarar, ið ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, kunnu geva fulltrú. Á heimasíðu bankans www.banknordik.fo, á partaeigaraportali bankans www.banknordik.com, umframt á høvuðsskrivstovu bankans er atgongd til eitt fulltrúarskjal, sum kann nýtast í hesum sambandi.

Til ber at geva nevnd bankans fulltrú til at møta og atkvøða tína vegna. Fulltrúin skal vera skrivlig, dagfest og móttikin á høvuðsskrivstovu bankans á Oknarvegi 5, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi týsdagin hin 23. mars 2021, kl. 16.00.

## Brævatkvøður

Á heimasíðu bankans www.banknordik.fo er atgongd til oyðublað at nýta í sambandi við brævatkvøðu. Um tú vilt greiða brævatkvøðu, skal oyðublaðið vera høvuðsskrivstovu bankans á Oknarvegi 5, Postboks 3048, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi hósdagin hin 25. mars 2021 kl. 16.00.

Eisini ber til at greiða brævatkvøðu umvegis partaeigaraportalin á www.banknordik.com í seinasta lagi hósdagin hin 25. mars 2021 kl. 16.00.

## Útgjald av vinningsbýti

Um aðalfundurin góðkennir uppskot nevndarinnar um rindan av vinningsbýti, verður hetta vinningsbýtið væntandi til taks á kontu hjá partaeigarunum mikudagin tann 31. mars 2021.

## Ársroknskapurin 2020 og fundarskrá við fullfíggjaðum uppskotum

Ársroknskapurin 2020 við grannskoðaraátekning og ársfrágreiðing umframt fundarskrá við fullfíggjaðum uppskotum fara at liggja frammi á høvuðsskrivstovu bankans og heimasíðu bankans www.banknordik.fo í seinasta lagi tríggjar vikur áðrenn aðalfundin.

## Avgerðir, partapeningur, atkvøðurættur og kontuførandi peningastovnur

Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, sambært § 9, stk. 2 í viðtøkum bankans.

Partapeningur bankans er kr. 192.000.000, býttur sundur í partabrøv upp á kr. 20. Hvørt partabræv á kr. 20 gevur eina atkvøðu á aðalfundinum. Tó eru ávísar atkvøðuavmarkingar galdandi sambært § 8, stk. 3 í viðtøkum bankans.

Í viðtøkum bankans eru hesar ásetingar um atkvøðurætt:

*8.1. Rættur partaeigarans at luttaka á aðalfundi og at atkvøða í sambandi við partabrøv síni, verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum partaeigarin eigur skrásetingardagsetingina. Skrásetingardagsetingin er ein vika, áðrenn aðalfundurin verður hildin.*

*8.2. Hvør partaeigari, sum hevur rætt at luttaka á aðalfundi, jvb. § 8. 1, og sum ynskir at luttaka, skal seinast 3 dagar undan aðalfundinum biðja um atgongumerki og atkvøðuseðil til aðalfundin.*

*8.3. Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu. Uttan mun til hvussu stóran part ein partaeigari eigur tilsamans av partapeninginum, kann hann fyri egin partabrøv ella sum fulltrúi fyri aðrar partaeigarar, ikki atkvøða fyri meira enn svarandi til 10% av partapeninginum tilsamans.*

*Ongar avmarkingar eru fyri fulltrúir til nevndina. Uttan mun til hvussu stóran part teir eiga tilsamans av partapeninginum, kunnu partaeigarar innan fyri somu konsern, soleiðis sum hetta hugtak er ásett í løggávuni, ikki saman atkvøða fyri meira enn svarandi til 10% av partapeninginum tilsamans.*

*8.4. Partaeigarar hava rætt til sjálvir at luttaka á aðalfundinum, saman við einum ráðgeva ella við fulltrúa, ið kann atkvøða hansara vegna, móti at løgd verður fram skrivlig og dagfest fulltrú, ið er givin fyri eitt tíðarskeið, sum ikki er longri enn eitt ár.*

*9.2. Á aðalfundinum verða øll mál avgjørd við vanligum atkvøðumeiriluta, uttan so at partafelagslógin ella hesar viðtøkur krevja serstakan meiriluta.*

*Uppskot um broytingar av viðtøkum bankans og uppskot um sjálvbodna avtøku og fusión kunnu bert samtykkjast, um uppskotið verður samtykt við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeninginum og treytað av, at minst 2/3 av partapeninginum er umboðaður á aðalfundinum.*

*9.3 Uppskot frá Fíggingargrunninum frá 1992 um broyting av ella fráfalli av quorum-kravinum í pkt. 9.2 kunnu samtykkjast við í minsta lagi 2/3 av bæði greiddum atkvøðum og tí á aðalfundinum við atkvøðurætti umboðaða partapeningi. Avmarkingar í pkt. 8.3 og pkt. 9.2 viðvíkjandi atkvøðu og fulltrú eru í hesum førum ikki galdandi.*

P/F BankNordik hevur gjørt samskipanaravtalu við VP Security A/S. Partaeigarar bankans kunnu velja P/F BankNordik sum kontuførandi stovn til at útinna teirra fíggjarligu rættindi gjøgnum P/F BankNordik.

P/F BankNordik
Nevndin

## Bilag 1: Bestyrelseskandidater

BANKNORDIK

**Ben Arabo**
Bestyrelsesmedlem
Født: 1973
Køn: Mand
Nationalitet: Færøsk
Kandidat for 2021
Uafhængig

**Uddannelse**

| | |
|---|---|
| 1997 | Cand.merc (Udenrigshandel) fra Handelshøjskolen i Aarhus. |
| 1995 | Ha(int) engelsk/tysk fra Handelshøjskolen i Aarhus. |

**Ledelsesposter og øvrige hverv**
Ben Arabo arbejder som selvstændig konsulent, og er bestyrelsesformand i P/F Vest Pack og P/F Atlantic Petroleum.

Ben Arabo har været CEO for P/F Betri, som driver bank og forsikringsvirksomhed på Færøerne. Han var før det CEO for det børsnoterede selskab P/F Atlantic Petroleum i en periode på 7 år, og arbejdede i en periode på 14 år for det amerikanske Fortune 500 selskab Hess Corporation, baseret i Tórshavn, London og Jakarta.

Ben Arabo har tidligere været bestyrelsesformand og bestyrelsesmedlem i P/F Posta, samt bestyrelsesmedlem i Eik Banki (nu Betri Banki), Grønlandsbanken og IT selskabet P/F Formula.

**Kompetencer**
Ben Arabo har et bredt kendskab til det færøske erhvervsliv og finanssektoren. Han har international erhvervserfaring og har siddet i ledelse og bestyrelse for pengeinstitutter og børsnoterede selskaber på Færøerne og i Grønland. Ben Arabo har således et indgående kendskab til virksomhedsdrift, strategi, ledelse og risikostyring.

**Jógvan Jespersen**
Bestyrelsesmedlem
Født: 1955
Køn: Mand
Nationalitet: Færøsk
Kandidat for 2021
Uafhængig

**Uddannelse**
2011 − 2013 HD (Graduate Diploma in Business Administration) Handelshøjskolen i Aarhus.

**Ledelsesposter og øvrige hverv**
Jógvan Jespersen er direktør for den færøske pelagiske brancheorganisation (Felagið Nótaskip) og bestyrelsesformand i Forskerparken P/F iNOVA. Herudover er Jógvan Jespersen bestyrelsesmedlem i den færøske rederiforening samt i fiskeriindustriens reservefond.

Jógvan Jespersen er forhenværende direktør i Kringvarp Føroya, samt tidligere bestyrelsesmedlem i P/F BankNordik (i perioden 1994-2006).

**Kompetencer**
Jógvan Jespersen har omfattende kendskab til det færøske erhvervsliv, ligesom han har betydelig viden om drift af færøske selskaber gennem sin bestyrelseserfaring i diverse færøske selskaber og foreninger.

**Sverre Bjerkeli**
Bestyrelseskandidat
Født: 1959
Køn: Mand
Nationalitet: Norsk
Kandidat for 2021
Uafhængig

**Uddannelse**

| | |
|---|---|
| 1992 | Financial for Executives Programme, INSEAD |
| 1984 | MSc Business and Marketing, Handelsakademiet (BI), Norge |

**Ledelsesposter og øvrige hverv**

Sverre Bjerkeli er stifter og CEO i forsikringsselskabet Protector Forsikring ASA.

I perioden fra 2001-2003 var Sverre Bjerkeli CEO i Eterra/Ementor (Atea). I perioden 1997-2001 var han direktør i skadesforsikrings-selskabet Storebrand/If Forsikring, mens han i perioden fra 1995-1997 var direktør i Storebrand Bank. Sverre Bjerkeli har desuden stiftet IT-selskabet Torinno hvor han var direktør i perioden 1990-1995.

Sverre Bjerkeli har siden 2012 været bestyrelsesmedlem i forsikringssegmentet i Finans Norge.

**Kompetencer**

Sverre Bjerkeli mangeårige erfaringer med og indgående kendskab til virksomhedsledelse og udvikling af performance kulturer inden for flere sektorer. Herunder forsikrings- og banksektoren samt i relation til software udvikling inden for IT sektoren. Inden for IT sektoren har Sverre Bjerkeli erfaringer med udvikling af software løsninger til både forsikringsselskaber og banker. Sverre Bjerkeli har desuden grundigt kendskab til kapitalallokering og strategiarbejde i både mindre og store selskaber.

Sverre Bjerkeli har med sine mangeårige arbejdserfaringer desuden et indgående kendskab til det nordiske forsikringsmarked samt den norske banksektor.

**Jóhanna Lava Køtlum**
Bestyrelseskandidat
Født: 1968
Køn: Kvinde
Nationalitet: Færøsk
Kandidat for 2021
Uafhængig

**Uddannelse**

| | |
|---|---|
| 2007 | Master i Teknisk videnskabelig Miljøvurdering fra Aalborg Universitet, Danmark. |
| 2002 | Cand. Scient i biologi fra Aarhus Universitet, Danmark. |

**Ledelsesposter og øvrige hverv**

Jóhanna Lava Køtlum har siden 2016 været direktør for opdrætslaboratoriet P/F Fiskaaling.

I perioden fra 2014-2016 var Jóhanna Lava Køtlum kontorchef for Fiskeriafdelingen i departementet for Fiskeri, Fangst og Landbrug hos det Grønlandske Landstyre.

Jóhanna Lava Køtlum var i perioden 2011-2013 direktør for miljøinstituttet på Færøerne (Umhvørvisstovan), mens hun i perioden 2007-2011 var afdelingsleder i samme institut.
Fra 2006-2007 var Jóhanna Lava Køtlum afdelingsleder i den færøske Veterinær- og Levnedsmiddelstyrelse (Heilsufrøðiliga Starvsstovan).

**Kompetencer**

Jóhanna Lava Køtlum har erfaringer med og et indgående kendskab til ledelse og strategiprocesser i såvel den offentlige som den private sektor. Herudover har Jóhanna Lava Køtlum mangeårige erfaringer inden for forvaltning og regulering af fiskeopdræt samt forvaltningsplaner, licenser og bilaterale forhandlinger inden for fiskeri. Desuden har Jóhanna Lava Køtlum erfaring med Nordisk og Europæisk samarbejde inden for miljø og fiskeri, eksempelvis som repræsentant i MiFi (Nordisk Miljø og Fiskerisamarbejde) og Nordisk arbejdsgruppe for BAT (Best Available Techniques).

**<u>Michael Ahm</u>**
Bestyrelseskandidat
Født: 1962
Køn: Mand
Nationalitet: Dansk
Kandidat for 2021
Uafhængig

**Uddannelse**

| | |
|---|---|
| 2019 | Applied AI Academy. Akademiet for de Tekniske Videnskaber |
| 2011 | Bestyrelsesakademiet. Københavns Universitet & Plesner, Advokatpartnerselskab |
| 2009 | INSEAD, Frankrig, Strategisk ledelse i pengeinstitutter |
| 2004 | INSEAD, Frankrig, Ledelsesprogrammer |
| 1989 | Master i Økonomi fra Københavns Universitet |

**Ledelsesposter og øvrige hverv**

Michael Ahm er adjunkt ved Handelshøjskolen i København, hvor hans primære arbejdsområder er analyser, kreditvurderinger og værdiansættelsesmetoder.

Michael Ahm medlem af Supervisory Board i Capital Market Partners A/S og bestyrelsesmedlem i Coop Bank A/S.

Tidligere har Michael Ahm været bestyrelsesformand i BigeFinancials A/S og bestyrelsesmedlem i Danske Andelskassers Bank A/S (DAB) samt selskaberne LDE 1 ApS, LDE 2 ApS og LDE 3 ApS, der har været en del af Maj Invest Gruppen.

**Kompetencer**

Michael Ahm har mangeårige erfaringer som ansvarlig for risikostyring og udarbejdelse af diverse finansielle og forretningsrelaterede analyser i Danske Bank, og har dermed et indgående kendskab til den finansielle sektor.

Michael Ahm har desuden international erhvervserfaring fra bl.a. David Garrick Ltd., London, hvor han har arbejdet med og rådgivet om salg af virksomheder.